# Føroyskur landabásur á Seafood Expo Global

# Kravfesting

## 0. Samandráttur

Føroya Arbeiðsgevarafelag biður um tilboð uppá sniðgeving, uppseting og niðurtøku av føroyskum landabási á Seafood Expo Global (SEG) í Brussel, umframt aðrar tænastur í hesum sambandi.

Biðið verður um tvey tilboð:
1. Tilboð uppá landabásin á messuni í 2020, við optión uppá leinging til messurnar í 2021 og 2022.

2. Tilboð uppá landabásin á messuni í 2020, 2021 og 2022 (sáttmáli fyri messulluttøkuna øll trý árini)

Talan er um alment útboð.

## 1. Vegleiðandi tíðarætlan:

14-06-2019: Kunnandi fundur, har áhugaðir tilboðsgevarar fáa høvi at seta spurningar.

28-06-2019: Síðsta freist at lata tilboð inn til Føroya Arbeiðsgevarafelag

31-07-2019: Sáttmáli undirskrivast við veitara.

01-10-2019: Yvirlitsplanur sendast sendast Føroya Arbeiðsgevarafelag til góðkenningar.

01-12-2019: Nágreinilig lýsing av sniðgeving sendast Føroya Arbeiðsgevarafelag til góðkenningar.

Talan er um vegleiðandi tíðarætlan, har dagfestingarnar kunnu broytast, t.d. í mun til broytingar í krøvunum frá SEG. Annars skal veitarin senda inn allar tær upplýsingar, sum fyriskipararnir av SEG krevja í sambandi við bygging av básinum, sí hjáløgda skjal í "Exhibitor Action Checklist 2019".

## 2. Grundleggjandi krøv

Føroyski landabásurin skal setast upp á básplássi 5-129 í Høll 5 í Brussel Exhibition Centre (sí yvirlitsplan yvir høll 5 í hjáløgdum skjali).

Básplássið er 8x32 fermetrar, í alt 256 fermetrar.

Landabásurin skal til eina og hvørja tíð lúka tey krøv og ásetingar, sum verða settar av fyriskiparunum á SEG, herundir Design Specifications & Exhibit Height Restrictions (sí hjálagt skjal), og tær deadlines sum eru fyri at lata inn tilfar til messufyriskipararnar, sum nærri lýst í Exhibitor Action Checklist (sí hjálagt skjal) á hvørjum ári.

## 3. Veitingar

**Básurin:**

*Yvirlitsplanur*

Uppgávan fevnir um at gera ein yvirlitsplan yvir básin, har tað sæst hvussu skilaveggirnir verða settir upp, og har tað er tilskilað hvørji øki, hvør einstøk fyritøka ræður yvir, og hvørji øki verða nýtt sum felagsøki.

Á sumri á hvørjum árið kunnu fyritøkurnar seta fram ynski um hvussu nógvar fermetrar tær ynskja á messuni komandi ár. Føroya Arbeiðsgevarafelag tillagar síðani ynskini, so samlaða fermetratalið hóskar til básstøddina. Yvirlitsplanurin kann tí broytast nakað frá ári til ár, og er tað uppgávan hjá veitaranum at gera nýggjan yvirlitsplan á hvørjum ári.

Veitarin fær í seinasta lagi 1. september 2019 eitt yvirlit frá Føroya Arbeiðsgevarafelag yvir luttakandi fyritøkurnar, og hvussu nógvar fermetrar hvør einstøk fyritøka hevur fingið tillutað. Út frá hesum og eftir at hava innheintað nærri ynski frá fyritøkunum, skal veitarin gera eitt uppskot til yvirlitplan, sum skal sendast Vinnuhúsinum til góðkenningar.

Um Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskir broytingar, verða hesar sendar veitaranum skjótast gjørligt, og skal veitarin tillaga yvirlitsplanin eftir hesum.

*Krøv til tilfar og grafiskan samleika.*
Básurin skal byggjast upp við gólvi, skilaveggum og einum grafiskum samleika, sum fortelur teimum vitjandi, at talan er um føroyska landabásin. Básurin skal hava eina grafiska heild, tó at hvør fyritøka sjálv ræður yvir sínum plássi á básinum.

Gólvið: Av tí at betongólvið í høllini kann vera óslætt, er ynski um at byggja upp eitt plant gólv, sum er gott at ganga á, evt. við beleggningi s.s. linoleum ella teppi. Í tilboðnum skal upplýsast um hædd, tjúkd og tilfar av gólvinum og evt. beleggningi.

Ljós: Tað er umráðandi at hava góð ljósviðurskifti á básinum. Ljós skal eisini lýsa á veggirnar, so at tilfar o.a., ið hongur á veggjunum, er sjónligt. Harumframt kann ljós verða nýtt til at lýsa upp aðra skelting.

Skilaveggir: Veggirnir skulu verða úr so mikið góðum tilfari, at teir eru stabilir, hóast nógv fólk og virksemi er á økinum. Veggirnir á básinum skulu vera í einum liti, sum hóskar til grafisku heildarmyndina. Liturin á veggum og gólvinum/teppinum skal ikki órógva heildarupplivingina av teimum einstøku básunum á landabásinum. Í tilboðnum skal upplýsast um tjúkd og tilfar av veggunum.

*Skelting v.m.*

Tann føroyski landabásurin skal hava skelting ella líknandi, sum greitt vísir, at talan er um føroyska landabásin. Orðini “Faroe Islands” skulu síggjast týðiliga, og tað skal bæði langt frá og tá tú stendur nær við landabásin vera sjónligt, at talan er um føroyska landabásin.- Skeltingin skal annars passa inn í heildina av básinum.

Veitarin hevur ábyrgdina av at heingja skelti upp eftir teimum reglum ið eru galdandi. Tað merkir eisini, at veitari má kanna umstøðurnar fyri at heingja skelti upp á SEG.

**Uppseting og niðurtøka av bási**:

Uppgávan fevnir um uppseting av bási sambært sniðgevingini og um niðurtøku av básinum. Um neyðugt skal veitarin eisini syrgja fyri, at ábøtur verða gjørdar á básin, meðan messan er, so góðskan á básinum verður varðveitt funktionelt og estetisk.

Veitarin sleppur inn á økið tá fyriskiparin av SEG loyvir tí (sambært galdandi reglum hjá SEG), og básurin skal verða klárur til nýtslu seinast 2 tímar áðrenn messan letur upp fyri gestum. Niðurtøkan av básinum kann byrja, tá messan er endað, í tráð við reglurnar hjá SEG.

Um tilfar til gerð av básinum skal goymast, er hetta eisini uppgávan hjá veitaranum.

**Býtið á fermetrum**

Býtið á fermetrum var á messuni SEG 2019 hetta:

Bakkafrost (60 $m^2$)

Varðin Pelagic (37 $m^2$)

JFK (34 $m^2$)

Pelagos (33,5 $m^2$)

North Pelagic (30 $m^2$)

Hiddenfjord/PRG (29 $m^2$)

Landshandilin (10 $m^2$)

Rainbow Seafood (10 $m^2$)

Servicerúm (12,5 $m^2$)

Fermetrabýtið og talið á luttakandi fyritøkum kann broytast frá ár til ár.

**Avmarkingar:**

Uppgávan fevnir ikki um ráðgeving ella sniðgeving í mun til luttakandi fyritøkurnar á teimum ymisku básunum. Heldur ikki um flutning ella goymslu av tilfari, sum framsýnarar sjálvir framleiða.

**Innbúgv (samskifti við fyritøkurnar):**

Veitarin skal tryggja, at neyðuga innbúgvið er til staðar á teimum einstøku básunum so sum stólar, borð o.s.fr. Hetta má samskipast við fyritøkurnar, og fyritøkurnar gjalda kostnaðin av leigu av innbúgvi v.m. Fyritøkurnar skulu fakturerast beinleiðis av veitaranum, og er hetta Føroya Arbeiðsgevarafelag óviðkomandi.

Um fyritøkur hava serlig ynski, eitt nú um loft í fundarhølum ella serliga útgerð, skulu fyritøkurnar fakturerast serstakt fyri hetta.

**Veitingar til básin:**

Hvør básur skal hava atgongd til streym.

Umhugsað verður eisini at hava felags Wifi til luttakararnar á føroyska landabásinum. Í tilboðnum skal kapasiteturin verða upplýstur (Mb/sek).

Køkurin skal hava rennandi vatn og frárensl og skal annars fylgja teimum forskriftum, sum SEG ger. Veitarin skal eisini syrgja fyri reingerð av básinum, meðan messan er, so hann altíð sær snøggur út, og skal fáa tryggja, at kannur við kaffi, the, vatn og juice eru á básinum við tilhoyrandi service. Roknast má við, at tørvur er á tveimum starvsfólkum til hetta arbeiðið. Veitarin rindar allar útreiðslur, ið standast av hesum.

Veitingin fevnir eisini um goymslu og flutningi av øllum tilfari, ymiskar installatiónir, íbindingar í messuhøllini, burturbeining av skrelli og annað sum kemur afturat í samband við uppseting og niðurtøku av básinum. Í tann mun, at tørvur í hesum sambandi er á veitingum frá messufyriskiparunum, sum viðføra eyka kostnað, skal hesin víðarifakturerast serskilt uttan eyka overhead. Søguliga hevur kostnaðurin av hesum sveiggjað nakað, men vanliga liggur hann undir kr. 40.000 fyri hvørja messu.

**Statusfundir og eftirmeting**

Veitarin skal luttaka í statusfundum, har gongdin í verkætlanini verður viðgjørd.

Veitarin skal eisini á hvørjum ári luttaka í einari eftirmeting av messuluttøkuni.

## 4. Krøv til tilboðið:

Saman við tilboðnum skal vera ein stutt lýsing av fyritøkuni og av týðandi undirveitarum, sum fyritøkan ætlar at nýta. Harumframt eina lýsing av royndum hjá fyritøkuni og undirveistarum at fyriskipa líknandi messuluttøku ella tiltøk.

Tilboðið skal verða útgreinað við einum tilboðslista, har tað er sjónligt, hvør kostnaðurin er fyri hvørja einstaka veiting.

Tilboðið skal innihalda eina skitsu av, hvussu tilboðsgevarin ímyndar sær grafiska samleikan á básinum.

Eisini skal greiðast frá tilfari av veggum og gólvi á básinum (serliga tjúkd og tilfar).

Biðið verður um tvey tilboð:
1. Tilboð uppá landabásin á messuni í 2020, við optión uppá leinging til messurnar í 2021 og 2022.

2. Tilboð uppá landabásin á messuni í 2020, 2021 og 2022 (sáttmáli fyri messulluttøkuna øll trý árini)

## 5. Meting av innkomnu tilboðunum:

Tá mett verður um tilboðini verður dentur lagdur á:

1. Kostnað
2. Heildarmeting av sniðgevingini
3. Góðsku av tilfari

4. Heildarmeting av veitara og týðandi undirveitarum

Føroya Arbeiðsgevarafelag tilskilar sær rætt til at velja frítt millum innkomnu tilboðini ella ikki at taka av nøkrum tilboði.

**6. Gjaldstreytir, fakturering v.m.**

50 % av sáttmálakostnaðinum fellur til gjaldingar skjótast dagin eftir, at sáttmálin er undirskrivaður.

25 % av sáttmálakostnaðinum fyri básin fellur til gjaldingar ein mánaða áðrenn Seafood Expo Global byrjar.

25 % av sáttmálakostnaðinum fyri básin fellur til gjaldingar dagin eftir, at Seafood Expo Global er liðug.

Lutfalsliga gjaldið fyri omanfyri nevndu sáttmálaupphædd fyri básin, skal fakturerast beinleiðis til luttakandi fyritøkurnar í mun til lutfalsliga fermetratalið, sum fyritøkurnar hava fingið tillutað. Gjald fyri felagsøki og møguligt tómøki verða eisini faktureraði í mun til lutfalsliga fermetratalið. Samlaða fermetratalið er 256 m2.

Føroya Arbeiðsgevarafelag garanterar fyri gjøldini, eftir nærri avtalu við veitaran.

Gjaldstreytirnar í samband við fakturering skulu vera, at gjaldast skal innan 20 dagar eftir fakturadato.

**7. Spurningar og svar**

Kunnandi fundur verður hildin í Vinnuhúsinum, Óðinshædd 7, 14. juni kl. 13.00, har áhugaðir tilboðsgevarar kunnu spyrja og fáa svar.

Tað ber eisini til at senda inn skrivligar spurningar. Bæði spurningar og svar verða gjørdir tøkir hjá øllum áhugaðum tilboðsgevarum á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum.

**8. Innlating av tilboði**

Tilboðið kann latast inn til Vinnuhúsið, Óðinshædd 7, 100 Tórshavn ella við telduposti til industry@industry.fo. Tilboðið skal vera Vinnuhúsinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. juni kl. 16.00. Tilboðið skal standa við í minsta lagi 60 dagar eftir tilboðsfreistina.

Kunnandi skjøl hjáløgd hesari kravfesting:

1. Design Specifications and Exhibit Height Restrictions fyri 2019
2. Yvirlitsplanur yvir høll 5 (føroyski landabásurin nr. 5-129)
3. Exhibitor Action Checklist 2019
4. Stand Approval Form 2019
5. Safety, Health and Environmental Charter form 2019